# Ketta á smáfuglaveiði





*Andrias Reinert heldur, at tað serliga eru smáfuglaungarnir, sum kunnu vera lætt offur hjá kettum*

*Mynd: Jan Muller*

**- Vit vita at ketta tekur fugl, men ilt er at siga, hvussu umfatandi henda veiða er, og hvat hetta merkir fyri smáfuglastovnin, sigur Andrias Reinert**

KETTUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Kettan, vit síggja á hesi myndini, hevði herfyri klintrað sær uppí eitt træ við Dalavegin í Havn. Uppi trænum sat ein ørgrynna av smáfuglum, og henda møguleika læt kettan ikki á sær sita. Men lítið kom burtur úr hjá henni. So skjótt, hon nærkaðist hæddini, lættu fuglarnir sær á og flugu sín veg. Eftir sat kettan uppi í trænum og átti nú túrin niðuraftur. Hóast hon neyvan kennir danska orðafellið, "Højt at flyve, dybt at falde", var hon ikki eins trygg á beinunum, tá ið hon skuldi koma sær niðuraftur úr trænum, sum tá ið hon so hugagóð krøkti seg uppeftir greinunum.

Men niðuraftur kom hon í øllum góðum.

Ongul í reyv!

### Taka smáfugl

At ketta tekur smáfugl, eru mong dømi um. Tú kanst síggja kettu við smáfugli, sum hon hevur tikið. Nærkast tú, rýmir hon við fonginum, har eingin tekur hann frá henni.

Men hvussu umfatandi man henda veiða so vera? Sosialurin hevur spurt Andrias Reinert, ið hevur stóran áhuga fyri náttúruni og tí, sum livir og andar í henni.

- Vit vita, at ketta tekur fugl, men eg veit ikki at siga, hvussu umfatandi henda veiða er, og eg dugi heldur ikki at siga, hvønn týdning hetta hevur fyri smáfuglastovnin.

Andrias sigur, at tey hava havt ein músabróð um húsini á Villingardalsvegnum í longri tíð, men knappliga ein dagin var gesturin burtur.

- Konan, Tóra, helt fyri, at nú mundu onkur ketta hava gjørt enda á honum.

Andrias heldur, at tað serliga eru smáfuglaungarnir, sum kunnu vera lætt offur hjá kettum, eitt nú staraungar.

- Eg havi eisini lagt til merkis, at deyðar hvørkveggjur kunnu liggja og rekast.

Hann sigur seg hava skilt, at ketta dámar ikki kjøtið í hvørkveggju, og tí etur hon tær ikki. Annars heldur hann, at ketta vanliga etur fuglin, hon tekur.

### Legst í haga

Andrias vísir á, at á fuglaplássunum eru teir ikki so glaðir fyri kettuna, tí teir halda, at hon kann leggjast á smáu ungarnar, sum ongan møguleika hava at verja seg.

- Ein gomul søga er eitt nú úr Norðradali. Har hevði ein frensur gjørt seg inn á líran. Teir funnu rættiliga nógvar líraveingir undir einum steini.

Hann sigur, at bøndurnir lovaðu, at tann, ið skjeyt frensin, skuldi fáa ein deyðsseyð afturfyri. Abbi mín gjørdi enda á hesum frensi og fekk ein deyðsseyð í løn.

- So nógv hevði tað at týða fyri haðan, at onkur fekk lívið av frensinum, sigur Andrias Reinert at enda.

# Formaðurin ímóti samanlegging

**17. apríl fara fólk í Elduvíkar kommunu at atkvøða, um leggjast skal saman við Runavíkar kommunu ella ikki. Væntandi er ikki, at stórur munur verður á ja og neiatkvøðunum, tí í bygdaráðnum eru trý fólk fyri samanlegging og tvey ímóti. Ein av teimum, sum ikki er fyri samanlegging, er bygdaráðsformaðurin, Andrias Hammer**

FÓLKAATKVØÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinasta leygarkvøld var borgarafundur í Funningsfirði í samband við, at fólk í Elduvíkar kommunu, sum fevnir um Elduvík og Funningsfjørð, skulu atkvøða fyri ella ímóti samanlegging við Runavíkar kommunu á fólkaatkvøðu, leygardagin, 17. apríl.

### Fá fólk

Andrias Hammer, bygdaráðsformaður, sigur, at færri enn 30 borgarar í kommununi vóru á borgarafundinum, har kunnað varð um sáttmálan, sum gjørdur er millum Runavíkar kommunu og Skála kommunu.

- Tað, sum okkum stendur í boði, er sami leistur, sum lagdur er millum hesar báðar kommunurnar við Skálafjørðin.

Á borgarafundinum í Funningsfirði greiddi Rodmundur Nielsen, býráðsformaður í Runavíkar kommunu, frá sáttmálanum millum Runavíkar kommunu og Skála kommunu. Við á fundinum var eisini bygdarráðsformaðurin á Skála, Kári Johannesen. Úr Havnini var Hilmar Høgenni, sum starvast á kommunalu deildini í landsstýrinum.

### Okkara lív

- Eg hevði væntað, at fleiri fólk komu til hendan fundin, tí tað, sum nú stendur fyri framman, snýr seg um okkara lív og gerandisdag, sigur Andrias Hammer.

Hann vísir á, at í Elduvíkar bygdaráði eru trý fólk fyri samanlegging og tvey eru ímóti.

- Sjálvur eri eg ímóti, men eg haldi, at fólkið í kommununi eigur at sleppa at tala við eina fólkaatkvøðu.

Andrias sigur, at hóast hann er ímóti samanlegging, hevur hann boygt seg fyri meirilutanum í bygdaráðnum sum ynskir, at málið kemur til eina fólkaatkvøðu.

- Sum formaður í kommununi argumenteraði eg á borgarafundinum ikki ímóti samanlegging, men royndi at vera neutralur.

Hann sigur, at fólk høvdu ymiskt at spyrja um, og náttúrliga vóru tað tey, sum eru ímóti ella ivast, ið áttu flestu spurningarnar.

- Men eg haldi, vit høvdu ein góðan fund sum vardi í hálvan triðja tíma, sigur Andrias.

Hann sigur, at hann er spentur eftir at vita, hvørja støðu fólkið í Elduvíkar kommunu fer at taka á fólkaatkvøðuni, 17. Apríl.

- Fólkið fer at avgera, um vit vera verandi ein sjálvstøðug kommuna – ella um samanlagt verður við stóru kommununa í Eysturoy, sigur Andrias Hammer.





*Á fólkaatkvøðu, 17. apríl, fara fólk í Elduvíkar kommunu, sum fevnir um Elduvík og Funningsfjørð, at taka støðu til samanlegging við Runavíkar kommunu*

### 88 fólk

Í Elduvíkar kommunu búgva tilsamans 88 fólk, harav eini 22-24 búgva í Elduvík og hini í Funningsfirði.

Kommunan er annars hampiliga væl fyri fíggjarliga. Skattainntøkan liggur um tvær mijónir krónur um árið, og skuldin er hálva aðru álíkning. Á bók eigur kommunan einar 800.000 krónur.

Andrias Hammer hevur verið formaður í Elduvíkar kommunu í hálvt annað ár.



# Nógv páskaferðsla um flogvøllin

**Sum vanligt plagar at vera, er nógv ferðslu um flogvøllin um páskirnar. Heldur meira enn í fjør, siga tey av flogvøllinum**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*



*Tað ferðast rættiliga nógv fólk til og úr Føroyum við flogfari um páskirnar*

*Mynd: Álvur haraldsen*

**Vágar:** Nógv ferðsla er um flogvøllin á páskum. Heldur meira, enn tað var í fjør, sigur Finnbogi Niclsen, flogvallarovasti.

Hann sigur, at bæði flogfeløgini hava úr at gera við at flyta fólk til og frá. Væl av fólki kemur heim til Føroya at halda páskafrí, og tað sama er galdandi fyri tey, sum fara av landinum.

Eisini í terminalinum sjálvum er nógv fólk hesar dagarnar. Fólk, sum koma við fólki, sum fer, ella eftir fólki, sum kemur. Og heilt nógv teirra koma við egnum bilum, sum eisini síggjast aftur uttan fyri, sigur Finnbogi Niclasen.

Hann sigur tó ongan trupulleika vera av bilferðsluni kortini. Um parkeringsplássini, sum eru, eru full, brúka fólk tað nýggja økið, sum slættað er oman fyir teminalin, at seta bilarnar á. Tað økið er ætlað til parkeringspláss. Men tað er ongan veg komið enn, longri enn bara til planering, tí bíðað verður eftir fíggjarlógini.

Kanningar, sum Vágatunnilin hevur gjørt, vísa, at tað koyra umleið 880 bilar gjøgnum Vágatunnilin dagliga. Og meira enn helvtin av teimum, sum koyra gjøgnum tunnilin, siga, at tey hava ørindi á flogvøllnum.

# Rulla páskaregg



*Børnini í Sóljugarði rullaðu páskaraegg skírisaftan. Tey líkasum tjóvstartaðu páskirnar*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Føroyingar halda framvegis tann sið í hevd at rulla páskaregg. Aðrastaðni kenna fólk ikki til hetta**

PÁSKAREGG
*Edvard Joensen*

**Sandavági:**
Enn rulla føroysk børn páskaregg. Og tey vaksnu eru heldur ikki heilt eiðasør at vera við. Minnast ivaleyst onkra hugnaliga løtu bønum, hóast veðrið ikki altíð hevur verið júst summarsligt annan páskadag.

Vanligt er at rulla páskareggini annan páskadag. Men tað ber nú eisini til at gera eitt frávik har, soleiðsi at um tú gongur í barnagarði, kann hetta avgreiðast skírisaftan, sum tey gjørdu í Sóljugarði í Sandavági.

Harraguð. Tað er jú vorðið heilt vanligt at sláa tunnu leygardagin undan føstulávint nógvastaðni, hugsa tey ivaleyst. Einki meira roks burtur úr tí. Í termodraktirnar og so í bøin.

Og børnini eru heilt væl nøgd við hesa skipanina. Tey rulla við vinfólkunum í barnagarðinum fyri páskir. Og gita so, at tey sleppa aftur ein túr annan páskadag at rulla við familjuni.

Og so er tað ein annar bólkur, sum eisini fegnast um hetta við fleiri døgum, har páskareggini liggja í bønum og bíða teimum. Tað eru likkurnar. Tær taka trúliga upp, tá eggini liggja sundurbotin í brekkunum.

NULLHUGSJÓNIN



• Ongin skal doyggja ella fáa álvarsligt mein av ferðsluvanlukku

• Alt virksemi í sambandi við ferðslu verður í samljóði við hesa stevnu

RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD